Skrivligur fyrispurningur
eftir § 52a í Tingskipanini

Spyrjari: Annika Olsen, løgtingkvinna

Svarari: Bjarni Kárason Petersen, landsstýrismaður í lógarmálum

Evni: Tilbúgving í føroysku tunlunum

Spurningar:

1. Hvussu metir landsstýrismaðurin um støðuna viðvíkjandi tilbúgving í teimum føroysku tunlunum?
2. Er landsstýrismaðurin sinnaður at arbeiða fyri einum samlaðum tilbúgvingarleisti fyri allar tunlar og undirsjóvartunlar í Føroyum?

Viðmerkingar:
Herfyri var áhugaverd ráðstevna í Kongshøll um tilbúgving í Føroyum, og hvussu Føroyar á besta hátt kunnu fyrireika seg til broyttu og spentu støðuna í heiminum í dag. Tað er átrokandi, at vit í Føroyum gera okkum til reiðar í mun til tilbúgving í breiðastu merking og gera mannagongdir fyri, hvat skal gerast í einari neyðstøðu.

Tosað hevur verið nógv um tilbúgving í samband við kritiska infrakervið so sum SEV, telesamskifti og nettrygdartilbúgving. Men tað hevur ikki nógv umrøða verið av tilbúgvingini av okkara heimligu viðurskiftum, og í hesum fyrispurningi verður fyrst og fremst hugsað um dagligu tilbúgvingina av øllum tunlunum og undirsjóvartunlunum í Føroyum.

Tá tað kemur til undirsjóvartunlarnar, hava kommunurnar eftir førimuni roynt at loyst hesa risaavbjóðing, men skuldi ein størri vanlukka hent, krevur hetta nógv størri samstarv tvørturum kommunur og land. Neyðugt er tí at fáa ein felags leist fyri allar tunlar, t.e. tilbúgvingarætlanir, mannagongdir, útgerð, venjingar, eftirmetingar, tilbúgvingarlæring og miðsavnan av samskifti í sambandi við tilbúgving í tunlunum.

Vit hoyra javnan, at eldur hevur verið í bilum í tunlunum kring landið, men hendir ein størri vanlukka í einum av okkara tunlum og ikki minst undirsjóvartunlum, er ongin yvirskipað og landsumfatandi tilbúgving, sum traðkar til, og tí verður hesin fyrispurningur settur landsstýrismanninum í tilbúgvingarmálum

Á Løgtingi, 6. februar 2025

Annika Olsen